Ógildar deyðarevsing

Guvernørurin í amerikanska statinum New Mexico, demokraturin Bill Richardson, skrivaði í nátt undir eina lóg, sum setir deyðarevsing úr gildi í statinum. Fyrr í vikuni samtykti kongressin í statinum eitt uppskot, at lívlong fongsulsrevsing verður tann harðasta revsingin í framtíðini. Deyðarevsingin er bara brúkt eina ferð í New Mexico, síðani hon bleiv sett aftur í gildi í USA í 1976. Tvey fólk, sum hava fingið deyðadóm, sita í fongsli í statinum. Bill Richardson segði í nátt, at hann kendi tað sum ein persónligan sigur at skriva undir lógina, sum ógildar deyðarevsing. Guvernørurin hevur leingi verið talsmaður fyri at taka deyðarevsingina av.



Pávin elvir til øsing

Tað hevur elvt til øsing nógvastaðni, at Benedikt pávi, sum er á vitjan í Afrika, hevur sagt, at vandin fyri at fáa eyðkvæmi veksur, tá fólk brúka hít. Franski heilsumálaráðharrin, Roselyne Bachelot, sigur við AFP, at tað kann prógvast, at orð pávans eru vísindaliga ósonn, og at pávin ger støðuna hjá afrikonskum kvinnum verri, enn hon longu er. Týska stjórnin hevur eisini funnist at orðum pávans. Stjórnin í Berlin sigur, at hítir bjarga mannalívum, og at tað er ábyrgdarleyst at virka ímóti, at fólk í menningarlondunum fáa møguleika fyri at útvega sær hítir.



*Her á krossinum Blómugøta-Sundsvegur-Óluvugøta er nú klárt at gera rundkoyring*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Klárt at gera rundkoyring

**Á býráðsfundi í gjárkvøldið varð samtykt at seta pening av at keypa privata jørð soleiðis, at klárt er at gera rundkoyring á krossinum Óluvugøta-Sundavegur-Blómugøta oman fyri Mylnuna**

RUNDKOYRING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ætlanin um at gera rundkoyring á krossinum Blómugøta-Sundsvegur-Óluvugøta omanvert Mylnuna er gomul, og var fyri á býráðsfundi fyrstu ferð á heysti 2005.

Umsitingin læt gera seks ymisk uppskot til rundkoyring, og eftir at málið hevði verið hjá P/F Verkfrøðingastovan, varð eftir teirra viðmæli arbeitt víðari við uppskoti fýra. Í hesum uppskoti varð ikki neyðugt at útvega jørð til rundkoyringina frá grannum, men hetta er tó seinni broytt, og hevur verið, um enn ikki ein snávingarsteinur so í hvussu er nakað, ið hevur verið við til at draga málið út.

Eftir at hava samráðst við eigaran av matr. nr. 1466 eitt longri tíðarskeið, er semja nú fingin millum eigaran og Tórshavnar kommunu um endurgjald, og tað varð hetta endurgjaldið, sum endaliga varð samtykt á býráðsfundinum í Tórshavnar býráð í gjárkvøldið.

Eftir semjuni skal kommunan rinda eigaranum munin millum verandi virði á húsunum og tað virðið, sum húsini fara at hava eftir at rundkoyringin er gjørd. Hetta er ein upphædd á 850.000 krónur.

Heðin Mortensen, borgarstjóri sigur, at við hesari samtyktini er klárt at gera rundkoyring á krossinum oman fyri Mylnuna, men at tað arbeiðið kortini ikki fer í gongd her og nú.

- Rundkoyringin er liðugt projekterað, og nú eru eisini allir formalitetir fingnir upp á pláss, so nú er klárt at fara undir arbeiðið. Men tað verður kortini ikki gjørt her og nú, sigur Heðin Mortensen.

Júst krossurin Sundsvegur-Óluvugøta er ringur at koma ígjøgnum, tá koyrt verður eftir Óluvugøtu, og tí hevði ein rundkoyring loyst ein stóran trupulleika í ferðsuni har.

Í kanningini upp undir projekteringina var eisini ein framrokning gjørd av ferðslumynstrinum í Havn fram til 2022.

Ikki er heilt greitt í løtuni, nær rundkoyringin omanfyri Mylnuna verður gjørd.

